Skal ikki misskiljast

- Øll limalondini vóru samd um nýggju upptøkureglurnar, og tað er heilt víst, at settu vit okkum ímóti hesum, høvdu vit samstundis biðið um at verið tveittir úr UEFA, sigur formaðurin í FSF millum annað um avgerðina á UEFA-aðalfundinum

Formaðurin í FSF harmast um, at støðutakanin hjá Føroyum í nýggju treytunum fyri limaskap í UEFA kann skiljast soleiðis, at FSF arbeiðir ímóti einum møguligum grønlendskum limaskapi í fótbóltssamgonguni.

ALTJÓÐA FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað hevur skapt eitt sindur av øsing í føroyska fótbóltsheiminum, at FSF herfyri atkvøddi fyri einum uppskoti frá UEFA, sum ikki loyvir nýggjum limum, um so er, at hesi lond ikki eru limir í ST. Øsingin stavar ikki minst frá, at Føroyskur fótbóltur seinnu árini hevur notið gott av, at Føroyar gjørdust aljtóða limir. Hetta hóast vit ikki nakran tíð hava havt sjálvstøðugan limaskap í ST.

Fingu ein trupulleika

At FSF atkvøddi fyri hesum uppskotinum, kann helst skiljast soleiðis, at nú Føroyar eru vorðnar limir í altjóða fótbóltssamgonguni, so leggja umboð okkara nú vertin á, um eitt nú Grønland ikki fær hendan møguleikan. Ikki minst, tá ríkisrættarligu støðurnar hjá okkum og Grønlendingum eru ikki sørt meinlíkar.

Torleif Sigurðsson, formaður í FSF, sigur sum viðmerking til hetta, at støðan hjá FSF í hesum málinum eigur at sígggjast í ljósinum av heilt øðrum spurningum, og ikki sum ein spurningur um, hvørt vit eru fyri ella ímóti grønlendskum limaskapi.

- Seinnu árini hava bæði FIFA og UEFA fingið ein trupulleika, tí tað eru ein ørgrynna av smærri tjóðum, sum hava havt eitt ynski um at gerast sjálvstøðugir limir í hesum samgongum, og harvið fáa ein part av altjóða fótbóltskøkuni. At byrja við var serliga FIFA lagaligt í viðgerðini av hesum spurninginum, men teir eru komnir mest sum í neyð av hesum, og tí varð gjørt av at endurskoða upptøkutreytirnar.

Ikki ímóti Grønlandi

Torleif sigur víðari, at tað er ræt, at FSF atkvøddi fyri hesum uppskoti, men tað hevði so einki at gera við, hvørt FSF er fyri ella ímóti, at aðrar smátjóðir fáa sama møguleika, sum Føroyar hava fingið í hesum sambandinum.

- Støðan hjá okkum er í stuttum tann, at vit eru einasta land í nýggjari tíð, sum er vorðið limur í UEFA, hóast vit ikki eru ein sjálvstøðug tjóð. Tað eru bert londini í Stóra-bretlandi, sum eru í eini líknandi støðu, og hesi hava alla tíðina verið limir í UEFA.

- Í nýggja álitinum, sum UEFA nú hevur samtykt, verða greiðar treytir settar fyri upptøku av nýggjum limalondum, men samstundis verður í lógini staðfest, at Føroyar og omanfyristandandi limir í enska kongaríkinum framhaldandi eru limir í UEFA. Hetta er gjørt fyri at tryggja limaskapin hjá hesum londum, og tað haldi eg vera sera flott gjørt av UEFA mótvegis okkum. Eg kann í hesum sambandi nevna, at tað ikki eru so nógv ár síðani, at skotið varð upp, at Ongland bert kundi taka lut við einum landi, men hetta uppskotið varð tó felt.

- Harafturat skal eisini havast í huga, hvussu lítlar Føroyar eru í hesum sambandi. Øll limalondini vóru samd um nýggju upptøkureglurnar, og tað er heilt víst, at settu vit okkum ímóti hesum, høvdu vit samstundis biðið um at verið tveittir úr UEFA, og um tað hendi, so ivist eg ikki í, at ágangurin móti okkum hevði verið nakað væl harðari, enn hann er í løtuni.

- Eisini kann málið snarast á høvdinum, tí um so er, at UEFA og FIFA framhaldandi hildu á fram at taka smátjóðir við í limaskaran, so hevði hetta heilt víst fingið avleiðingar fyri okkara møguleikar at takast við tey stóru. Tað hava ofta verið røddir frammi um, at lítlu tjóðirnar einki hava at gera í hesum sambandi, og við einum øktum limatali vildu hesar røddir blivið alsamt harðari. Avleiðingin hevði verið, at lítlu tjóðirnar vórðu koyrdar í bólk fyri seg uttan møguleika at takast við tey stóru. Sostatt høvdu vit bert hitt lond sum Luksemburg, Malta, Liktenstein og líknandi, og hetta hevði ikki verið eins eggjandi ella mennandi hjá leikarum okkara, og ikki minst hevði hetta minkað munandi um fíggjarligu møguleikarnar hjá okkum at vera við.

Eru ikki líkar

Annars vísir FSF-formaðurin eisini á, at hóast Føroyar og Grønland í nógvar mátar eru í somu støðu, so er ein ávísur munur tó á.

- Fyrst og fremst er tað tann munurin, at vit altíð hava skipað fyri okkara egnu kappingum her heima. Hetta var eitt argument, sum nýttu nógv, tá vit í sínari tíð stríddust fyri altjóða viðurkenning. Vit vístu á, at vit ongan tíð hava verið limir í DBU ella DIF, og at vit høvdu okkara egnu skipan at kappast eftir.

- Við allari virðing fyri Grønlandi, so er støðan á hesum øki ikki tann sama hjá teimum. Teir eru limir í DBU, og landskapping teirra er als ikki skipað sum her hjá okkum, men fer ístaðin fram sum ein stevna, sum verður avgreidd yvir heilt fáar dagar.

- Og lat meg at enda eisini siga, at eg eisini haldi mun vera á ítróttarligu støðuni hjá okkum og Grønlandingum. Nú skal eg sjálvandi ansa eftir, at tað ikki verður tikið sum ein provokatión, men eg meti støði á føroyskum fótbólti at vera væl hægri enn tað grønlendska. Aðrenn vit fóru við til eina undankapping, høvdu vit vunnið sannførandi á Oyggjaleikunum, og til samanberingar kann nevnast, at Grønland endaði í níðaru hálvu av teimum londum, sum vóru á leikunum hesa ferð.

- Vit hava alla tíðina sett okkum sum treyt, at skulu vit vera við, skal hetta vera bæði fíggjarliga og ítróttarliga forsvarligt, og vit hava eisini tikið avleiðingarnar, tá hetta ikki hevur verið so. Eitt nú tóku vit fyribils kvinnulandsliðið úr altjóða kappingum, tá vit frá fleiri síðum fingu tað skoðsmál, at vit høvdu veikasta kvinnulandslið í UEFA, og løgdu tá heldur dent á at arbeiða við U-landsliðnum hjá kvinnum, soleiðis at ítróttarligu møguleikarnir framyvir skuldu mennast.

- Lat meg at enda siga, at tað harmar meg almikið, at støðutakan okkara á aðalfundinum av summum verður tikið sum eitt tekin um ósolidariskan atburð móti grannum okkara, og eg vóni, at tey sjónarmiðini, sum eg nú havi ført fram, kunnu geva eitt betri innlit í, hví FSF hevur valt at tikið hesa støðu, sigur formaðurin í FSF at enda.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

Todi ikki við móti Ajax

Tað er framvegis óvist, nær føroyski álopsspælarin í FCK verður førur fyri at spæla aftur

Tað ber ikki til at siga annað, enn at tað seinastu mánaðirnar hevur gingið alt annað enn væl hjá Toda Jónsson.

Í kvøld klokkan 17.30 føroyska tíð fer FCK at spæla í UEFA Cup í Parkini. Og júst sum hinar báðar ferðirnar, tá FCK í hesum kappingarárinum hevur spælt í Europa Cup í Parkini, so verður Todi Jónsson hesa ferð ikki á vøllinum, men á áskoðaraplássunum.

– Burtursæð frá í september, tá eg spældi fýra dystir, so havi eg orsaka av skaðum verið burtur frá liðnum síðani fyrst í juni, og tað er rættuliga frustrerandi, sigur Todi Jónsson á heimasíðuni todi.fo.

Síðstu vikurnar hevur ætlanin verið, at Todi skuldi royna seg. Fyrst í oktober var tað í Øresunds Cup, sum er kapping millum næstbestu liðini hjá eitt nú Malmø FF og FCK. Tað eydnaðist ikki. So var ætlanin, at Todi skudi spæla við í Super Cup ímóti Silkeborg, men tað eydnaðist heldur ikki.

– Eg taki ein dag í senn. Eg venji tað, sum skal til, og so má tíðin vísa, nær tað fer at bera til at spæla aftur, er skilagóði hugburðurin hjá Toda Jónsson.

Spennandi avbjóðing

At Todi iðrar seg um, at hann ikki er tøkur, nú FCK aftur skal spæla í Europa Cup, er einki at siga til. Tí avbjóðingin hjá FCK í kvøld er sera spennandi.

Ajax Amsterdam er oddalið í hollendsku landskappingini. Teir hava ikki tapt í hesum kappingarárinum, og teir eru seks stig frammanfyri Feyenoord, sum er næstfremst.

Ajax hevur tey seinastu árini ikki verið í sama europeiska flokki, sum teir ofta áður hava verið. Tað sást m. a. í, at tað fyrr í heyst miseydnaðist teimum at kvalifisera seg til Europa Cup fyri meistaralið. Samanlagt taptu teir 3–2 ímóti skotska Celtic. Men nú verður kortini roknað við, at Ajax, sum altíð hevur verið tiltikið fyri at spæla álopskendan og hugflogsríkan fótbólt, er á veg aftur á toppin, og úrslitini í landskappingini higartil benda á, at tað orduliga gongur rætta vegin.

Todi hevur eina ferð spælt ímóti Ajax Amsterdam. Á sumri í 1998 spældu FCK og Ajax venjingardyst í Parkini. Hollendska liðið vann 4–2. Tey, sum sóu dystin í Eurosport, minnast ivaleyst, at Todi misnýtti ein ógvuliga stóran málmøguleika.

Glæsiliga søgu

Ajax Amsterdam er eitt av teimum europeisku feløgunum, sum tey seinastu tredivu árini hevur vunnið mest, og sum hevur havt nakrar av bestu og kendastu spælarunum.

Hagtølini siga, at Ajax hevur verið hollendskur meistari 28 ferðir. Teir hava fjúrtan ferðir vunnið heimligu steypakappingina. Nýggju ferðir hava teir vunnið Europa Cup, og tvær ferðir hava teir vunnið heimsmeistarakappingina fyri lið.

Tá tað kemur til spælarar, so hugsa tey flestu ivaleyst fyrst um Johan Cruyff, sum var høvuðsspælarin, tá liðið í sjeyti árunum vann Europa Cup fyri meistarar tríggjar ferðir á rað, og sum var liðformaður á landsliðnum, sum í 1974 vísti mest undirhaldandi avrikini, men kortini tapti finaluna í HM endaspælinum, sum varð spæld í Vesturtýskalandi. Á olympiska vøllinum í München vunnu vertirnir 2–1.

Men tað er eingin endi á øðrum fínum spælarum, sum hava spælt við Ajax. Úr røðini kunnu vit nevna Neeskens, Kroll, Gullit, van Basten, Rijkaard, Kluivert og finska Litmanen. Og so hava fleiri av bestu donsku fótbóltsspælarunum spælt við Ajax. Frank Arnesen og Søren Lerby vóru bara 16 ára gamlir, tá teir tíðliga í sjeyti árunum fóru til Amsterdam, og síðani hava t. d. Henning Jensen, Michael Laudrup og Jesper Grønkjær spælt í Ajax, har núverandi danski landsliðsvenjarin, Morten Olsen, hevur verið venjari.

Glæsiliga søgan og stóra danska íslettið í Ajax munnu borga fyri, at áhugin fyri dystinum í Parkini í kvøld er stórur. Dysturin verður vístur á TV3+ rásini.

Fernandez tøkur

Upp undir stóra dystin hevur í donskum fjølmiðlum verið gjørt nógv burturúr, at FCK hevur verið so skert, tá tað viðvíkur álopsspælarum.

Fótbóltshugaðir føroyingar halda sjálvandi, at tað er sera spell, at Todi Jónsson ikki er tøkur. Tað halda tey eisini í FCK. Men samstundis fegnast tey um, at Heine Fernandez verður førur fyri at spæla. Hann hevur verið skaddur í fleiri vikur, og teir ivaðust í, um hann yvirhøvur fór at verða førur fyri at spæla fótbólt aftur. Men í fyrradagin var greitt, at maðurin, sum skoraði øll fýra málini, tá FCK sendi jugoslaviska Obilic úr UEFA kappingini, verður førur fyri at spæla ímóti Ajax Amsterdam.

Liðkappingin

BRIDGE
Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen

FM kappingin fyri lið

Fyrsta umfar í FM kappingini fyri lið verður leikt í Bridgehúsinum í Havn vikuskiftið 2. og 3. november.

Í 1.deild leika tey 6 liðini, sum kvalifiseraðu seg í fjør. Hesi vóru:

Allan Dal-Christiansen, Farodane, Símin Lassaberg, Carl Mikkelsen, Hanus Bærentsen og Jóna Grunnveit.

Tað er ikki óvanligt, at lið broyta navn. Liðini bera antin navn eftir liðskipara ella sponsori. Liðið hjá Farodane hevur fingið nýggjan sponsor og eitur nú Junior BussTaxi. Vit frætta seinni, um nakað av hinum liðunum eisini hevur broytt navn.

Til kappingina í 2.deild er frí tilmelding. Í fjør leiktu 8 lið í aðru deild. Tann nýggi kappingarleiðarin hjá FBS, Marjun Restorff, heitir á øll, ið ætla sær at spæla við í liðkappingini komandi vetur, at seta seg í samband við seg á telefon 319142 í seinasta lagi 22. oktober.

Skráin fyri kappingarárið hjá FBS kemur í Sosialin komandi viku, men hon verður eisini at síggja á heimasíðuni hjá Havnar Bridgefelag: www.bridge.fo

Nevndin hjá FBS hevur skipað seg soleiðis:
Mortan Rasmussen, formaður
Carl Mikkelsen, kassameistari
Finn Ougaard, skrivari
Marjun Restorff, kappingarleiðari
Kaj Alstrup

Opið hús sunnudagar

Fyri nøkrum árum síðan var opið hús í Bridgehúsinum sunnudagar við góðari undirtøku. Hetta datt seinni niðurfyri, men nú kemur gongd í aftur. Tað eru Rói á Rógvu Joensen og Johannes Skaarup, sum fyri Bridgehúsið hava sett sær fyri at fáa gongd í aftur hetta tiltakið. Opið hús verður í Bridgehúsinum komandi sunnudag kl. 14.00, og ætlanin er, at folk ongantíð skulu koma til læstar dyr í Bridgehúsinum sunnudag í vetur.

Kollfirðingar í Vági

Suður gevari
Allir í hættu

	Norður Sp 4 Hj K76 Rú K9865 Kl 10954	
Vestur Sp AK106542 Hj QJ984 Rú 7 Kl -		**Eystur** Sp J98 Hj A10532 Rú Q Kl KJ32
	Suður Sp Q7 Hj - Rú AJ10432 Kl AQ876	

V	N	E	S
-	-	-	1rú
3rú?	3sp!	pass	4kl
pass	pass?	4hj	5kl
5hj	5sp?	D	6kl
pass	pass	D	pass
pass	pass		

Tað er Fríðhild Petersen úr Kollafirði, sum situr í Sunnan stólinum. Spælið er frá einari bridgeútferð í Vági, og er sera trupult at melda, serliga um tit ikki eru von at spæla saman. Norður og Suður hava 6rú og 6kl í kortunum við einans 19 hp, og Eystur og Vestur hava 6sp og 6hj í sínum kortum.

Sunnan opnar við 1rú. Hvat skal Vestur melda? Vestur stendur seg best við at melda 1sp inn, men her valdi hann at melda 3rú, sum er Københavner-konventionen og vísir minst 5-5 í báðum teimum hægstu ómeldaðu litunum. Norðan meldar 3sp — bluff!! Hann veit, at E-V ikki hava spælt saman áður, og roynir at koyra grús í maskinaríið. Eystur visti ikki síni livandi ráð, so hann meldaði bara pass. Sunnan meldar 4kl, sum er natúrligt, og Vestur meldar pass fyri at síggja, hvussu leikur ferð. Norðan meldar pass — kanska átti hann her at sagt 5kl. Nú kemur loksins Eystur upp í leikin við 4hj. Tá roykurin hevði lagt seg, skuldi Sunnan spæla 6kl, sum Eystan dupladi.

Mótspælið byrjaði við at taka spA og helt fram við hjQ, sum Sunnan trumfaði. Hon trumfaði spQ á borðinum og spældi kl10, sum Eystur dekkaði við dreinginum. Fríðhild fekk fyri klQ, spældi seg út á borðið aftur uppá rúK og klípti allan trumfin burtur úr Eystan. 12 stikk!

Í vetur fer Bridgehúsið aftur at verða opið sunnudagar, og er Rói á Rógvu Joensen, sum her sæst høgrumegin, ein av teimum, sum hevur tikið stig til hetta